**Býráðsfundur hósdagin 26. september 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Páll Isholm møtti á fundi kl. 19.45 og var ikki við til viðgerðina av máli nr. 1

**Fundurin lokin kl. 22.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| **1.** | **11/00358**<br>**Umsókn um farloyvi frá Eysturkommunu býráð**<br>Terji Lervig hevur biðið um farloyvi frá býráðnum frá 14. september 2011 til 14. oktober 2011. | Einmælt samtykt at ganga umsóknini hjá Terja Lervig á møti, og at næsti maður á lista B, Svenn Olsen tekur hansara sæti í býráðnum og nevndum. |
| **2.** | **11/00309**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til stuðlar**<br>1.viðgerð varð á seinasta býráðsfundi og tá varð samtykt, at kr. 220.000,00 verða fluttar til konto 3.26.31.510 (Stuðlar) frá konto 2.21.31.510 (Barnavernd)<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð. | Einmælt samtykt at geva eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð |
| **3.** | **11/00323**<br>**2.viðgerð av eykajáttan til Gøtu skúla**<br>1.viðgerð var á seinasta býráðsfundi og tá varð samtykt at eykajáttað kr. 1.900.000,00, og at peningurin verður tikin av innistandandi.<br><br>Eingin broyting er frá 1. viðgerð. | Samtykt at geva eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Páll Isholm<br>Jan E. Petersen<br>Jóhan Christiansen<br>Hanna Jensen<br>Svenn Olsen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Fríðgerð Heinesen<br>Joen Magnus Rasmussen<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Tollakur Joensen |
| **4.** | **11/00356**<br>**1.viðgerð av eykajáttan til kommunufyrisitingina**<br>Fíggjarnevndin samtykt á fíggjarnevndarfundi tann 12. september 2011 at taka av tilboðnum frá Lóður | Einmælt samtykt at taka málið av skrá. |

**Býráðsfundur hósdagin 26. september 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Páll Isholm møtti á fundi kl. 19.45 og var ikki við til viðgerðina av máli nr. 1

**Fundurin lokin kl. 22.00**

uppá 80.000,00 kr. fyri kanning av kommunusamanlegging.

Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á kr. 70.000,00

Peningurin verður tikin av konto 5.24.13.510 (Vinarbýarsamstarv). Restin 10.000,00 verða tiknar av verandi játtan til kommunufyrisiting

**5. 11/00337**

**Fíggjarætlan fyri 2012**

Sambært grein 39 í kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 21. september at leggja fyriliggjandi uppskot við einum avlopi aftaná rentir og avdrátt á kr. 1.035.712,47 fyri býráðið.

Skattaprosentið verður lækkað við 1% til 21%

Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**6. 11/00359**

**Tilboð uppá timbur- og betongarbeiði, Sarpurgerði**

Lisitatión var tann 20. september upp á timbur- og betongarbeiði til bygningin í Sarpugerði, og trý tilboð komu inn

Kostnaðurin fyri nevnda arbeiði kann fíggjast av **konta 5.24.62.511** Ítróttaranlegg (løgujáttan)

Tekniska nevnd mælir til at tikið verður av lægsta tilboðnum sum er frá Sp/f MTM Bygging á kr. 1.010.000,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisk nevnd

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Býráðsfundur hósdagin 26. september 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Páll Isholm møtti á fundi kl. 19.45 og var ikki við til viðgerðina av máli nr. 1

**Fundurin lokin kl. 22.00**

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

**7. 11/00360**
**Tilboð uppá HVS og ventilatiónsarbeiði, Sarpugerði**

Lisitatión var tann 20. september upp á HVS og ventilatiónsarbeiði til bygningin í Sarpugerði, og seks tilboð komu inn

Kostnaðurin fyri nevnda arbeiði kann fíggjast av **konta 5.24.62.511** Ítróttaranlegg (løgujáttan)

Tekniska nevnd mælir til at tikið verður av lægsta tilboðnum sum er frá ÁWAY upp á 1.042.248,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisk nevnd

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

*Tollakur Joensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**8. 10/00476**
**Kloakk í Leirvík**

Lisitatión var uppá kloakkleiðingar fram við á Bakka í Leirvík (í fjørðuni). Hetta er uppsamling av verandi kloakkleiðingum frá húsunum á Bakka, ið skal leiðast niðan til Kráarvegin sum síðani rennur út á streymasjógv. Trý tilboð komu inn

Kostnaðurin fyri nevnda arbeiði krevur eina eykajáttan uppá kr. 700.000,00 kr.

236.622,00 kr. kann fíggjast av **konta 6.30.41.511** Kloakkir (løgujáttan)

Tekniska nevnd mælir til at taka av tilboðnum hjá RTS/JHR íroknað 10% sum óvantað útreiðslur, t.v.s samlaði kostnaðurin verður 1.030.284,20 kr.

Einmælt samtykt at taka upp samráðingar við RTS/JHR.

## Býráðsfundur hósdagin 26. september 2011 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Svenn Olsen, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen, Tollakur Joensen og Hans Mourits Foldbo

Páll Isholm møtti á fundi kl. 19.45 og var ikki við til viðgerðina av máli nr. 1

## Fundurin lokin kl. 22.00

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tlmælinum hjá teknisk nevnd

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum huðrum*

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Páll Isholm ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Svenn Olsen ______________________________